

# Vit søkja Navision ráðgevar

Vegna økt virksemi, bæði í Føroyum og uttanlands, verður søkt eftir dugnaligum Navision ráðgevum til deildina Business Solutions.

Arbeiðið á deildini er fjølbroytt og fevnir um allar tættir innan veiting og verksetan av MBS Navision verkætlanum, herundir

- Ráðgeving
- Menning
- Verksetan
- Brúkarahjálp

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi við dugnaligum og góðum starvsfeløgum. Vit syrgja fyri, at tú fært neyðugu útbúgvingina innan MBS Navision.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur góðan kunnleika til og royndir við Navision ella aðrari líknandi skipan. Eisini er umráðandi, at tú hevur hegni og hug til at arbeiða við KT. Vit vænta, at tú ert útbúgvin innan roknskap og hevur royndir á hesum øki.

Tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og at loysa uppgávur sjálvstøðugt, men hevur eisini evnir til at gerast ein virkin og góður samstarvsfelagi sum partur í verkætlanum.

**Starvstreytir**
Løn og onnur starvsviðurskifti verða avtalað í tráð við royndir og førleika.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Snæbjørn Jacobsen á telefon 344076. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til sbj@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Stiðjagøta 5
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. september 2005.

**Formula.fo**

Formula.fo er Føroya største privata KT fyritøka við yvir 60 fólkum í starvi. Eitt av virkisøkjunum er Fíggjarstýringsloysnir, bygdar á skipanir frá Microsoft Business Solutions, herundir Navision.

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

formula.fo

www.sansir.fo



# Leiðari til nýggjan serdagstovn

## til børn við atferðar- og tilknýtingartrupulleikum

Ætlanin er at seta á stovn ein serdagstovn til børn við álvarsligum atferðar- og tilknýtingartrupulleikum. Í hesum sambandi søkir Almannastovan eftir leiðara til serdagstovnin. Setanin er tó treytað av góðkenning frá landsmyndugleikunum.

Serdagstovnurin verður skipaður sum landsstovnur undir Almannastovuni og verður tann fyrsti av sínum slagi í Føroyum. Serdagstovnurin skal styrkja og menna tað einstaka barnið bæði sálarliga, sosialt og motoriskt, soleiðis at tað miðvíst kann verða arbeitt við, at barnið so skjótt sum gjørligt er ført fyri at samskifta við onnur og kann koma aftur í vanligan dagstovn.

Serdagstovnurin er normeraður til 8-10 børn í aldrinum 0 til 7 ár. Ætlanin er, at serdagstovnurin skal hava møguleika og pláss fyri samdøgurumlætting. Serdagstovnurin kemur eftir ætlan at liggja í miðstaðarøkinum.

Serdagstovnurin er undir uppbyggjan, og kemur leiðarin at standa fyri hesi uppgávu. Ætlanin er, at serdagstovnurin verður normeraður við 5 starvsfólkum umframt leiðaran.

Leiðarastarvið er eitt fulltíðarstarv. Uppgávan er at leiða serdagstovnin og samskipa arbeiðið hjá starvsfólkunum. Leiðarin skal tryggja, at tað einstaka barnið fær ta viðgerð og menning, sum tað tørvar. Leiðarin skal saman við fakligari upptøkunevnd avgera, hvørji børn verða upptikin á serdagstovnin. Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum, og skal harumframt samskipa samstarvið millum stovnin, foreldrini og myndugleikarnar umframt fakligan serkunnleika uttanfyri stovnin.

Søkt verður eftir persóni við viðkomandi útbúgving so sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi ella við aðrari líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at leiðarin, umframt viðkomandi fakliga útbúgving og royndir, eisini hevur leiðslu - og fyrisitingarligar royndir, góð samstarvsevni, er virkisfúsur og er opin fyri broytingum.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 5. september 2005 kl. 12.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 44 93 39